# Nýggj í starvi í Føroya Banka



**Poula Michelsen Kass** er sett í starv sum bólkaleiðari á marknaðardeildini hjá Føroya Banka. Hon tekur við starvinum 1. juli 2006.

Poula Michelsen Kass er 30 ára gomul, fødd og uppvaksin í Hann. Poula hevur í summar tikið HD-prógv í organisatión og leiðslu av Handilsháskúlanum í Århus. Frammanundan hevur hon prógv sum marknaðarøkonom og starvsroyndir frá P/F Poul Michelsen og DER.



**Elsa Jóhanna Høgenni** er sett í starv á marknaðardeildini hjá Føroya Banka. Elsa Jóhanna er 43 ár og bachelor í vinnulívsløgfrøði av Handilsháskúlanum í Keypmannahavn. Í løtuni er hon í ferð við Master of Management á Robert Gordon University í Aberdeen.

Seinnu árini hevur Elsa Jóhanna starvast sum lærari á Føroya Handilsháskúla og verið leiðari á Vestnorden Tourist Board, sum skipar fyri Vestnorden Travel Mart. Hon byrjar í Føroya Banka 15. august 2006.



**John Rajani** er settur í starv sum leiðari fyri nýggja Corporate Finance-virkisøkinum hjá Føroya Banka. Corporate Finance er ráðgeving í sambandi við keyp og sølu av fyritøkum. Hann tekur við 15. august 2006.

John hevur HA-prógv av Copenhagen Business School í Keypmannahavn og MBA-prógv av University of Lancaster í Bretlandi. Hann hevur verið deildarstjóri í Tinganesi síðan september 2005. Áðrenn tað var hann í trý ár sendimaður Føroya í London, og frá 1999 til 2002 var hann løgmansritari í landsstýrinum.



**Eyðun Lisberg** er settur í starv á deildini hjá Føroya Banka í Kollafirði frá 15. mai 2006. Eyðun er 39 ára gamal og ættaður úr Hvalba, nú búsitandi í Kvívík.

Eyðun er útbúgvin bilmekanikari og hevur síðani tikið HH-prógv, merkonomprógv í marknaðarføring og fyrsta part av HD. Hann starvaðist frá 1984 til 2002 á søludeildini hjá Reyni-Service og síðan hjá VR-Bilum í Havn.



**Bárður Kass Nielsen** er settur í starv á stjórnarumsitingini hjá Føroya Banka frá 1. august 2006. Bárður er 29 ára gamal og ættaður av Nesi á Toftum. Hann hevur seinastu fimm árini lisið á Handilsháskúlanum í Århus og verður liðugur sum cand.merc. í fíggjarstýring í summar.




# Herða stríðið móti narkotika



**Stríðið móti ólógligum innflutningi av rúsandi evnum verður nú hert. Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, leggur í næstum fram uppskot um broytingar í toll-lógini, sum hava við sær, at tolleftirlitið gerst munadyggari**

POLITIKKUR

Sum liður í altjóða stríðnum móti narkotika er ætlanin at herða tolleftirlitið.

– Ábendingar eru um, at ikki bert hash, men eisini sterkari evni sum amfetamin og ecstasy, gerast alt meira vanlig millum ung í Føroyum. Tí mugu vit gera meira fyri at forða fyri, at evnini sleppa inn í landið, sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum.

Hann leggur upp til nakrar broytingar í tolllógini, og endamálið er at herða eftirlitið. Frameftir skal tolleftirlitið hava elektroniska atgongd til upplýsingar um ferðafólk og góðs. Tollvaldið skal eisini hava heimild at skráseta upplýsingar um fólk, ið verða tikin fyri ólógligan innflutning.

Talan er um upplýsingar, ið bert skulu nýtast til tolleftirlitið, og endamálið er í samsvari við altjóða atlitini um at berjast móti rúsevnum og ólógligum innflutningi av góðsi.

Í triðja lagi er ætlanin, at tollvaldið skal hava ein servandan narkotikahund afturat hundinum, sum frammanundan arbeiðir fyri tollvaldið.

– Frameftir skal tollvaldið hava møguleika at arbeiða meira málrættað og munadygt. Broytingarnar í tolllógini eru liður í royndum okkara at avdúka smugling – serliga við rúsevnum, sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum.